TAKS

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
GONGIN 7
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN

Dagfest: 11. november 2020
J. nr.: 20/42820-1
P-tal/V-tal: 463418
Títt skriv:

Frágreiðing til Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Í sambandi við at Landsgrannskoðanin var á vitjan hjá Barsilsskipanini, varð biðið um frágreiðing upp á, hví saldo á kreditorum var økt sera nógv í 2018 og til og við 2020.

Barsilsskipanin hevur tí eftirkannað allar bókingar í Barsilsskipanini, stovnsnr. 135575, og hevur staðfest, at ein feilur er íkomin, tá ið KT-skipanin varð broytt í sambandi við lógarbroytingina í 2018, tá ið Barsilsskipan fór at gjalda eftirlønir hjá persónum og arbeiðsgevarum.

Feilurin er, at tá ið nýggju kreditorkonturnar, 1554/1562, eru upprættaðar í 2018 til eftirlønir, eru upphæddirnar krediteraðar á rakstrarkontu fyri kontubólkin persónar og debiteraðar á rakstrarkontu fyri kontubólkin eftirlønir, t.e., at salda gevur kr. 0,00 í rakstrinum.

Bókingin má tí broytast til, at kontur 1554/1562 skulu strikast, og í staðin skal bókast beinleiðis á rakstur.

Staðfest er við mánaðarligari avstemman, at øll útgjøld frá Barsilsskipanini til persónar og arbeiðsgevarar eru rætt. Øll útgjøld eru avstemmað mánaðarliga, og kekklistar eru gjørdir hvønn mánað.

Fyri 2020 fáa vit rættað beinleiðis í rakstrinum, og metingin av útgjøldunum sær út til at vera 157 mió. kr., ið er tað sama, sum seinasta metingin til Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísir.

Rættingarnar fara at ávirka eginognina soleiðis:
2018: kr. -4.148.381,94
2019: kr. -7.120.509,42

Eginognin pr. 1. januar 2020, stovnsnr. 004050-05	kr.	11.071.455
Rættingar 2018/2019	kr.	-11.268.891
Mett meirnýtsla 2020.....	kr.	-10.200.000
Negativ eginogn, stovnsnr. 004050.....	kr.	-10.397.436

Postboks 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

Fyri at tryggja, at slíkur feilur ikki hendir aftur, verður kekklisti gjørdur, har rakstur verður avstemmaður við útgjøld. Munurin millum hesar upphæddir skal avstemmast við kreditorar. Staðfestast skal eisini, hvørjir kreditorarnir eru, og hvat víðari hendir við málinum. Serliga skal hyggjast eftir, um kreditorkontur fáa debetsaldo.

Hjálagt er skjalprógv sum vísur hvar bókingar feilurin er.

Vinarliga,
TAKS

Mai-Britt Vinther
deildarleiðari
tel. +298 352760

Postboks 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo